Gunnar vann aftur

Triðju ferðina á rað eydnaðist tað Gunnari-Dahl Olsen at vinna býarsúkklingina

BýARSÚKKLING
tíðindaskriv

Nógv varð lagt fyri, tá kappast varð í býarsúkkling um vikuskiftið

Leygardagin 30. aug. skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri árligu FM-súkklukappingini í Býarkoyring, ella Criterium. Súkklað var á Hálsi í Havn. Málið var uttan fyri bygningin hjá Føroya Tele á Heykavegi. Teinurin var Heykavegur – Starvegur – Falkavegur – Tjaldursvegur – Heykavegur.

Bæði børn, unglingar og menn kappaðust.

Veðrið var gott. Tað var turt og sólin kagaði fram inn í millum. Eitt sindur av vindi var, men ikki so nógv at tað bilti nakað.

Til kappingin hjá monnum vóru fimm luttakarar. Favoritturin til at vinna kappingina var Gunnar Dahl-Olsen, og tað gjørdi hann eisini sannførandi, men ikki uttan kapping frá Eli J. Christiansen. Teir báðir fylgdust til uml. tíggju minuttir vóru eftir, tá rykti Gunnar og Eli megnaði ikki at súkkla hann inn aftur. Triðja plássið fekk Christian Guttesen úr Nordepli. Esmar Joensen, sum eftir ein steðg í uml. eitt ár er byrjaður aftur at súkkla, bleiv nummar fýra.

Eitt óhapp hendi í kappingini. Tað var danin Palle Melchiorsen, sum fyri stuttum er fluttur til Føroya, sum datt. Østbeinið høgru meðna fór úr lið, og fekk hann tískil ikki gjøgnumført kappingina.

Kappingin hjá dreingjum 12 til 14 ár á kappsúkklu var sera spennandi. Teir vóru fýra luttakarar, og hava hesir kappast alt summar í móti hvørjum øðrum. Teir fylgdust í uml. átta umfør, tá rykti Torkil Weyhe, og fekk eitt hol aftur til hinar. Munin megnaði hann at halda líka til hann kom á mál. Teir tríggir sum vóru aftanfyri hann stríddust allir, og tað eyðnadist eisini Rúna Bláfoss at sleppa frá Sigmund Olsson og Rana G. Jacobsen. Men Sigmund gavst ikki so, og fekk Rúna aftur beint áðrenn málstrikuna, og vann sær sostatt eitt annaðpláss.

Finnur Mellemgaard hevur vunnið næstan allar súkklukappingarnar sum hava verið í summar fyri dreingir 9 til 11 ár rættiliga lættliga. Men hesuferð mátti hann veruliga stríðast fyri gullið. Hann og Jógvan Ólavson spurtaðu um fyrstaplássið, men Jógvan kláraði ikki at halda tørn og Finnur vann tí.

Statoil Føroyar og Føroya Bjór stulaðu við steypi, heiðursmerkjum o.ø.

Fótbóltur 1. deild menn
Máltindurin

John Petersen	**B36**	**9**
Hjalgrím Elttør	KÍ	9
Andrew av Fløtum	HB	8
Heðin á Lakjuni	B36	7
Helgi L. Petersen	NSÍ	7
Sonni L. Petersen	NSÍ	6
Birgir Jørgensen	VB	6
Milan Kulic	VB	6
Jákup á Borg	B36	5
Súni Friði Johannesen	B68	5
Krzystof Popczynski	GÍ	5
Rógvi Jacobsen	HB	5
Karsten From	NSÍ	5
John Heri Dam	B68	4
Egil á Bø	EB/S	4
Hans Pauli Samuelsen	EB/S	4
Ronnie Samuelsen	EB/S	4
Sorin Anghel	EB/S	4
Clayton Soares	FSV	4
Kim Poulsen	FSV	4
Símun Samuelsen	GÍ	4
Rúni Nolsøe	HB	4
Tór-Ingar Akselsen	HB	4

Úrslit frá býarsúkklukapping uppi á Hálsi

Teinurin: Heykavegur – Starvegur – Falkavegur – Tjaldursvegur – Heykavegur.
Mál og start var beint uttanfyri Føroyar Tele á Heykavegi.

Menn koyrdu 45 min + 1 umfar.
1 Gunnar Dahl-Olsen
2 Eli J. Christiansen
3 Christian Guttesen
4 Esmar Joensen

Útgingin: Palle Melchiorsen

Unglingar koyrdu 45 min + 1 umfar.
1 Hans Krosstein
2 Bergur Johansen

Útgingin: Dánjal Michalsen

Dreingir undir 8 ár koyrdu 3 umfør.
1 Jógvan Mellemgaard
2 Jákup Ólason
3 Sofus Andreasen
4 Ragnar Kruse
5 Sveinur Kass

Gentur undir 8 ár koyrdu 3 umfør.
1 Hildur Poulsen

Dreingir 9 til 11 ár koyrdu 5 umfør
1 Jógvan Mellemgaard
2 Jógvan Ólason
3 Símun Vestergaard
4 Jens Pauli Johansen
5 Martin Kragesteen
6 Harald Joensen

Gentur 9 til 11 ár koyrdu 5 umfør
Nr.1 Helena Gunnarsdóttir Jaobsen

Dreingir 12 til 14 ár á kappsúkklu koyrdu 13 umfør
1 Torkil Weyhe
2 Sigmund Olsson
3 Rúni Bláfoss
4 Rani Gunnarson Jacobsen

Dreingir 12 til 14 ár á fjallasúkklu koyrdu 10 umfør.
1 Niels Christiansen

Gentur 12 til 14 ár koyrdu 10 umfør.
1 Sólja Christiansen

Støðan

		DYSTIR	VUNNI		JAVNT		TAPT	VUNNIN M L	TAPT M L	M L MUNUR	STIG
1	**HB**	**14**	**9**	**-**	**4**	**-**	**1**	**33**	**14**	**19**	**31**
2	B68	14	8	-	5	-	1	20	8	12	29
3	NSÍ	14	8	-	4	-	2	26	11	15	28
4	B36	14	9	-	1	-	4	28	15	13	28
5	KÍ	14	6	-	2	-	6	17	22	-5	20
6	EB/Str.	14	5	-	4	-	5	24	28	-4	19
7	GÍ	14	4	-	4	-	6	16	22	-6	16
8	VB	14	3	-	4	-	7	15	24	-9	13
9	FS V	14	2	-	2	-	10	18	34	-16	8
10	**Skála**	**14**	**1**	**-**	**0**	**-**	**13**	**8**	**27**	**-19**	**3**

Rúni sleppur undan fyrsta umfarinum

BK Tromsø slapp å spille 1. runde i europacupen (1.9.2003)

Rúni Weihe, sum nú spælir flogbólt við Tromsø BK í Noreg, skal í heyst royna seg í Europa-Cup kappingini í flogbólti.

Her lagaði lutakastið seg soleiðis, at Tromsø kom beinleiðis í 2. umfar í kappingini. Hetta verður leikt um vikuskiftið, 24.-26. oktober, og verður tað í Finnlandi, at Rúni og teir skulu royna seg.

Hini liðini í bólkinum hjá Tromsø eru Isku-Volley úr Tampere, Finnlandi, Speranta Kishinev úr Moldava og Aer Lingus úr Írlandi.

-jm

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

Skeið í psykiatri

Endamálið við skeiðnum er at geva luttakarunum eina størri vitan um psykiatriska órógv, so at tey verða betur før fyri at fáa eyga á sálarsjúkueyðkenni og at skilja sjúklingin.

Skeiðið er partur av einari longri eftirútbúgving innan psykiatriska økið, ið byrjar tíðliga í 2004 og sum lýst verður við seinni í ár.

Skeiðið vendir sær til røktarar, sosial- og heilsuatstøðingar, pedagogar, sjúkrarøktarfrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, sosialráðgevar og onnur, ið arbeiða ella koma at arbeiða innan psykiatriska økið og heimarøktina.

Skeiðið varar eina viku frá 24. til og við 28. november 2003, hvønn dag frá 8 til 16 og kostar 2.500,- kr.

Tað er »Uddannelsesafdelingen, Psykiatrien i Århus Amt,« í samstarvi við Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, ið skipar fyri.

Nærri upplýsingar um skeiðið og tilmeldingarblað til tað, umframt komandi eftirútbúgvingina fáast við at venda sær til Psykiatriska depilin við Landssjúkrahúsið í Tórshavn til
Inger M. Gabrielsen á tlf. 313540 lok 323,
teldupostur: inmaga@lsh.fo

Tilmelding í seinasta lagi 1. oktober 2003.

Psykiatriski depilin
Landssjúkrahúsið
100 Tórshavn

LÝSINGAR
PLAKATIR
T-SHIRTS
SKILTIR
FLØGG...
-kassan alt grafiskt arbeiði
GRAFIX
TRONGISVÁGUR
22 42 51

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Sosialurin hjálpir tær at halda skil á føroyskum viðurskiftum
Uttan Sosialin
Við Sosialinum

FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Bókhaldsfólk

Starvið sum bókhaldari í Familju - og heilsumálaráðnum, Fyrisitingarligu Eindini, verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast eftir nærri avtalu.

Arbeiðsuppgávurnar fevna serstakliga um:
Ábyrgd av avgreiðslu og bókingum av øllum, sum hevur við raksturin av Familju - og heilsumálaráðnum og Almannamálaráðnum at gera. T.v.s. fyri stjórnmálaráðini, stovnar og annað virksemi, sum hoyra beinleiðis undir stjórnmálaráðini. Harumframt aðrar fyrifallandi uppgávur, serliga í móttøkuni/vekslaranum í tann mun, tað er neyðugt.

Førleikakrøv:
- Skrivstovuútbúgving/HH/ merkonom , ella líknandi.
- Umsøkjarar, ið hava arbeitt við bókhaldið og hava gott rokniskaparinnlit, hava fyrimun.
- Haraftrat verður dentur lagdur á, at umsøkjarar hava hug og áræði at arbeiða sjálvstøðugt.
- Somuleiðis er tað ein fyrimunur um ein er vanur við at nýta telduútgerð í arbeiðinum.

Setanarøkið fevnir um Familju- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí.

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið verður lønt í bólki III.

Upplýsingar og umsókn:
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hansu Sørensen, deildarleiðara tlf. 30 40 40, ella teldupost: has@hmr.fo

Skrivlig umsókn við avrriti av prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til:

Familju - og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 17. september 2003 kl. 12.00.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sethús í Vági til sølu

Sethúsini eru í trimum hæddum, og standa í Toftalíð.
Í miðhæddini er køkur og stova. Á loftinum eru 3 kømur, umframt vesi. Í kjallaranum er baðirúm.

Grundøkið: 308 m²
Húsavídd: 48 m²
Úthús: 8 m²

Grundstykki í Vági til sølu

Matrikul nr. 93ᶜ, í Toftalíð, Vágur.
Grundøkið: 631 m²

Nærri fæst at vita við at venda sær til Suðuroyar Sparikassa, telefon nr. 373064 ella á heimasíðu okkara www.sparsu.fo

Suðuroyar Sparikassi
Postboks 2 · FR-900 Vágur
Tlf. 37 30 64 · Fax 37 33 40

Suðuroyingar

Skeið til buss, lastbil og trailara
byrjar **hósdagin 4. sept. kl. 19**

Í hølum Fylkingar

Spf. KOYRIKORTIÐ
tel. 31 88 21 og tel. 21 87 77

Sosialurin 341800

Almennur fundur

Leygardagin 6. september kl. 18.00 skipar Nýrafelagið fyri almennum fundi í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Formaðurin í danska Nyreforeningen, Stig Hedegaard Kristensen, næstformaðurin Lone Kiilerich og Ole Lings, konsulentur hjá Nyreforeningen fara at røða um evnini: **Hvat krevur ein dialysusjúklingur anno 2003, Lógin um heiladeyðskriteriið og transplantatión, Kostur til nýra-/dialysusjúklingar** og um **Avvarðandi/foreldur til nýrasjúkling.**

Nýrafelagið